

# Feminina

## Varrastiftin bjargar kreppuni

Kvinnur vilja undir ongum umstøðum vera varrastiftina fyriuttan. Tað er ein gamal sannleiki, at sølan av varrastiftum veksur, tá búskaparstøðan versnar. Hetta verður rópt 'the lipstick index' og merkir bara, at vit vilja ikki nokta okkum sjálvum tað lítla lekra, hóast ráðini eru minni. Kosmetik-vinnan er eisini tann einasta, sum ikki kennir sviðan av kreppuni. Bara í januar vaks sølan av smyrsli í Danmark við 4.6 prosentum, samanborið við sama mánað í fjør, skrivar Børsen. Tíbetur er The Body Shop úti við einari røð av biligum varrastiftum í 37 ýmiskum litum.

Lagt til rættis: Rigmor Dam





Fyri bert 50 krónur bjóðar Tjaldurs Apotek í Havn sær at kanna, hvørja húðtýpu tú hevur. Ring og bílegg tíð til eina húðskanning á tlf. 341100.

## Mirakulsalvan hjá stjørnunum




Smith's Rosebud Salve er ein metseljari kring allan heim, ið stjørnur sum Drew Barrymore, Kate Hudson, Jessica Simpson, Gwyneth Paltrow og Alicia Keys brúka. Smith's Rosebud Salve hevur fingið prísin sum Best Beauty buy í InStyle Magazine trý ár á rað. Brúka salvuna á varrunum, á neglabondunum, á hondum og fótum, á eygnabrýrnum, til hárið, undir make-up og til útslett. Fæst hjá Cosmeto og Matas.

## Góðbitar til bindi- ella bókaklubban

Søtar vinkonur



Summarsligt góðgæti í vøkrum kramarhúsum til bestu vinkurnar

## Út úr skápinum

Vilt tú vera millum tey hippastu í býarmyndini? So er tað nú, at gamli cowboyjakkin skal út úr skápinum!

